gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Ávarar móti eysturlendskum tilstandum

**– Hví ber tað ikki til í føroyskum politikki at skapa breiðar semjur um viðurskiftini hjá almennu fjølmiðlunum? Tað ber til í flestu londunum, sum vit helst vilja samanbera okkum skrivar útvarpsstjórin í bersøgnari grein í blaðnum í dag**

KRINGVARPSLÓG
*Jan Müller*


*Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri*

– Er tað veruliga so, at vit skulu siga okkara samstarvsfeløgum í teimum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, at í Føroyum er so at siga full politisk semja um, at almennu fjølmiðlarnir skulu vera ein partur av almennu umsitingini. Tú skalt heilt til eystureuropa fyri at finna líknandi skipanir, og har vórðu tær flestu annars vrakaðar fyrst í 90-árunum.

So bersøgin er Jógvan Jespersen, útpvarpsstjóri í grein í blaðnum í dag, har hann viðger viðferðina, sum uppskotið til nýggja kringvarpslóg fær frá Mentanarnevnd Føroya Løgtings. Útvarpsstjórin er sera ónøgdur við ta viðferð, sum málið um nýggja kringvarpslóg hevur fingið.

Hann vísir til gondina í málinum og m.a. til tær viðmerkingar, sum landsgrannskoðarin hevur til málið. Landsgrannskoðarin sigur í sínum notati, at sambært uppskotinum til broytingar í kringvarpslógini verða tveir juridiskir »bastardar« stovnaðir, og á týðandi økjum setir lógaruppskotið til viks grundleggjandi áestingar í stýrisskipanarlógini, játtanarskipanini, roknskapar- og grannskoðaralógini.

– Er hetta rætt, so vórðu »bastardarnir« væl stovnaðir við lógini frá 1998, og so mugu grundleggjandi trupulleikar vera í umsitingini, sum eiga at verða tiknir til viðgerðar skrivar útvarpsstjórin.

Hann vísir á, at myndugleikarnir hava havt nógv høvi til at gera løgtingið vart við sína støðu. Hesi høvi hava teir tó ikki brúkt.

– Tað, sum undrar, er, at tú umsitingarliga kanst broyta so grundleggjandi skipanir, uttan tað verður gjørt eftir eina greiða politiska støðutakan. Men er tað løgtingsins vilji, so fær tað jú ikki verið øðrvísi skrivar Jógvan Jespersen.

Í 1997 varð nevnd sett at fyrireika uppskot til nýggja lóggávu fyri kringvarpsøkið í Føroyum. Sjálvur luttók útvarpsstjórin í hesum nevndararbeiði sum umboð fyri ÚF. Nevndin legði stóra orku í hetta arbeiðið, og varð m.a. lóggávan í okkara grannalondum gjølla kannað. Lógaruppskotið varð serliga gjørt við fyrimynd í donsku og grønlendsku lóggávuni.

Nevndin brúkti nógva tíð til at koma fram til eitt uppskot til eina skipan við javnvág millum tað frælsið, sum stovnar av hesum slagnum eiga at hava í okkara samfelagsskipan og tað eftirlit, ið teir so ella so skulu vera undir.

Tá var tilgongdin við at taka fíggjarætlanina hjá ÚF og SvF við aftur á fíggjarlógina sum játtan til landsstovn byrjað, uttan at tað tá varð fingin greiða á, hvussu hetta játtanarslagið skuldi skipast, men sjónarmiðini hjá gjaldstovuni og landsgrannskoðanini vórðu kend.

Jógvan Jespersen skrivar, at nevndin umrøddi hesi viðurskifti gjølla, og í uppskotinum, sum nevndin legði fyri landsstýrið, varð mælt til, at tann parturin av virkseminum hjá stovnunum, sum verður fíggjaður við útvarpsgjaldi, lýsingum og spæli, ikki skuldi játtast á fíggjarlógini, og harvið heldur ikki takast við í landsroknskapin, meðan fíggjarstøðan hjá stovnunum sum higartil varð skrásett í fíggjarstøðuni hjá landinum. Tá talan var um at seta skott millum almennu fjølmiðlarnar og politiska myndugleikan varð lógin meira avmarkandi enn samsvarandi lóggáva í okkara grannalondum.

– Eg veit ikki um, at tað í viðgerðini í lógardeildini hjá landsstýrinum, í umsitingini hjá løgtinginum, ella í løgtingsviðgerðini av uppskotinum til kringvarpslóg, varð sett spurnartekin við, at lógin var grundleggjandi í stríð við stýrisskipanarlógina, játtanarskipanina, og roknskapar- og grannskoðanarlógina skrivar Jógvan Jespersen og leggur aftrat: – Er tað so, at tað er støðan, so mást tú undrast yvir, at avvarandi myndugleikar ikki hava nýtt høvi til fyrr at gera vart við seg í einum so álvarsligum máli. Fíggjarmálastýrið kundi havt gjørt vart við hesi viðurskifti, og eisini løgtingsgrannskoðararnir kundu havt gjørt vart við, at kringvarpslógin átti at verið tillagað grundleggjandi føroyskari lóggávu. Ella bara søgdu, at tað eisini vóru onnur sjónarmið um hesi viðurskifti. Men tað gjørdu teir ikki.

– Hví ber tað ikki til í føroyskum politikki at skapa breiðar semjur um viðurskiftini hjá almennu fjølmiðlunum? Tað ber til í flestu londunum, sum vit helst vilja samanbera okkum við skrivar útvarpsstjórin m.a. í grein síni á síðu 9 í blaðnum í dag. Sí eisini oddagrein um sama mál.

# Starvsvenjing – ein góður vegvísari

**At skúlar lata næmingar fara út í starvsvenjing og royna ymisk arbeiðspláss, er ofta ein stór hjálp hjá næmingunum**

*Annika Bech*



*Rakul Mortensen av Toftum er í starvsvenjing á apotekinum*

Av tí, at tað eru so sera nógvar útbúgvingar at velja ímillum, er tað ofta sera ringt at vita hvat ein ætlar sær at útbúgva seg sum. Ofta er tað so nógv ymiskt sum ein gongur og hugsar um, men ein veit ikki rættiliga hvat øll hesi størvini innibera. Tá kann tað hjálpa ótrúliga nógv at sleppa út á arbeiðsplássini og uppliva tað sjálvur, ístaðin fyri kanska at lesa okkurt um tað, ella at hoyra frá øðrum hvussu tað er.

Vit vóru úti og spurdu nakrir praktikantar, hvussu teimum dámdu og hvat ið starvsvenjing hevur at siga fyri teir.

Fyrsti túrur var oman í Apoteki í SMS. Har møttu vit Rakul Mortensen. Rakul gongur í 10. flokki í Tofta skúla. Hon byrjaði í starvsvenjing mánadagin 23. Vit vóru og høvdu eina samrøðu við hana.

Vit spurdu hana millum annað hvussu henni dámdi har, og tað dámdi henni sera væl. Øll vóru sera blíð ímóti henni, og hon segði okkum, at hetta var møguliga okkurt sum hon fór at arbeiða við í framtíðini.

»Eg havi bert verið her í tveir dagar, men eg eri sloppin at síggja meðan tey gjørdu massagukrem uppi í laboratoriðinum og tað hevur verið ógvuliga áhugavert«.

Síðani gekk leiðin niðan til sjúkrahúsið, tí har hava tey eisini ein praktikant. Hon eitur Mary Højgaard. Mary gongur eisini í 10. flokki í Tofta skúla.

»Mær dámar sera væl at vera her. Beint nú eri eg hjá laborantunum, men eg sleppi eisini at royna meg í vaskaríinum, í køkinum, hjá portørunum og fysioterapeutunum.

Tá ið vit komu niðan til laborantarnir, var tað lætt at síggja, at har treivst hon. Tey ið arbeiddu har, vóru beinanvegin klár við einari hjálpandi hond, vístu okkum ymiskt o.t.

»Eg havi verið við, tá ið tey taka blóðroyndir, eg síggi hvussu ein vanligur arbeiðsdagur fer fram, eg havi nomið kunnleika við klinisk kemisku avdeilingina, immunulogisku avdeilingina og mikrobiologisku avdeilingina«.

»Hetta er heilt vist nakað fyri meg. Eg haldi at hetta er sera spennandi og áhugavert.«

Rakul og Mary eru báðar samdar í tí, at tað er sera gott hjá næmingum at sleppa í starvsvenjing, tí tá sær og upplivir ein rættiliga hvussu tað er úti á arbeiðsplássunum.

Mong halda óivað, at tað er púra óneyðugt at loyva næmingum í starvsvenjing. Halda kanska, at tað er spill av tíð, at næmingurin skal fáa frí úr skúlanum fyri at fara út at arbeiða.

Lívið er sum ein vegur við nógvum sneiðum og krossvegum, um ein ikki hevur nakran vegvísara, er tað skjótt, at ein tekur tann skeiva vegin og verður vilstur.


*Mary Højgaard av Toftum er í starvsvenjing á Landsjúkrahúsinum*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



# Tunnlar og tangar

**Í Fuglafirði verður enn ein frystitunnil tikin í nýtslu fyrsta dagin. Og bunkringarmøguleikarnir á havnarlagnum eru teir bestu í landinum**

KOMMUNUPOLITIKKUR
*Edvard Joensen*

**Fuglafirði:** Tað er sera umráðandi at geva vinnuni, sum heldur til á og kring havnarlagið, so góðar umstøður, sum til ber, sigur borgarstjórin í Fuglafirði. Og tann setningin metir hann, at Fuglafjarðar Kommuna livir upp til.

Tað liggur eitt stórt, grønt farmaskip og lossar á Fuglafirði. Truckarnir koyra til og frá. Teir koma við fullum plattum inn eftir havnarlagnum og hvørva so sum undir heilt. Og tað er í grundini eisini tað, teir gera. Teir fara inn í bergið, har teir leggja vøruna, teir flyta, í eina frystigoymslu, sum sprongd er inn í klettin.

Hetta skipið, sum nú lossar her, er frystiskip, sum komið er úr Kanada við rækjum, sum skulu leggjast á goymslu í frystitunnlinum hjá Bergfrost, greiðir Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði frá.

– Føroyskar rækjur, leggur hann aftrat. Fluttar frá føroyslum rækjutrolarum, sum hava lagt upp í Kanada.

Fuglafjarðar Kommuna hevur gjørt fimm hallir inn í bergið norðarlaga á havnarlagnum. Hesar hallirnar verða brúktar til goymslur av ymsum slagi. Eitt nú frystigoymslur.

Tann partin, sum hevur við frystingina at gera, røkir felagið Bergfrost. Bergfrost hevur í løtuni møguleika at goyma eini 3.000-4.000 tons, sigur borgarstjórin. Men frystiorkan verður munandi økt um eina viku ella so, tá enn ein frystihøll verður tikin í brúk. Tá fer samlaða frystiorkan at vera eini 6.000-7.000 tons.

Men teir vilja meira enn so, tí enn ein høll verður væntandi tikin í nýtslu í summar, sigur borgarstjórin í Fuglafirði. Og tá fer at bera til at goyma umleið 10.000-12.000 tons av fyrstum fiskavørum í tunnlunum í Fuglafirði.

## Skjót bunkring

Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, greiðir frá, at Fuglafjørður hevur best útgjørdu oljugoymslu í landinum, tá talan er um skipabunkring.

– Og tað merkist eisini, tí tann stóri oljutangin er tómur í heilum. Bara hendan seinasta mánaðan hava tvey tangaskip verið við olju, sigur hann.

Borgarstjórin sigur, at stóri oljutangin norðast á havnarlagnum er útgjørdur til at kunna lata 300 tons av olju um tíman. Til sammetingar vísir hann á, at tær oljugoymslurnar aðrastaðni í landinum, sum klára skjótastu bunkringina, klára bara at lata 70 tons um tíman.

Hendan tænastan er neyðug, sigur borarstjórin, tí sum kunnugt er rættiliga stór skipaferðasla í Fuglafirði.

Rættiliga vanligt hevur verið, at skip, sum landa í Fuglafirði, eitt nú tey stóru svartkjaftaskipini, hava bunkrað, samstundis sum landað hevur verið. Tá hava vanliga tangabilar verið nýttir.

Men Sigurd Simonsen sigur, at væntandi verður tað ikki so leingi, til tað als ikki verður loyvt at bunkra, samstundis sum fiskur verður landaður. Og ta støðuna er Fuglafjarðar Havn longu útgjørd til við hesum møguleikunum, oljugoymslan hevur.


*Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Havsbrún víðkar aftur

**Árliga útbyggingin á Havsbrún er í gongd. Í ár verður seinni partur av fóðurfoymsluni, sum byrjað varð upp á í fjør, gjørdur**

FISKIÍDNAÐUR
*Edvard Joensen*

**Fuglafirði:** Havsbrún í Fuglafirði er í støðugari menning, og bygt verður út á hvørjum ári. Í ár veðrur fóðurgoymslan enn einaferð víðkað.

Fóðurgoymslan hjá Havbrún verður longd norðureftir. Talan er um ein rímiliga stóran bygning í vavi, um enn hann ikki er so øgiligur í prísi, sigur Bergur Poulsen, stjóri á Havsbrún.

Tilbyggingin, sum nú verður gjørd er umleið 2.000 fermetrar til víddar og fer væntandi at kosta einar fimm milliónir krónur, sigur Bergur Poulsen.

Í Fjør vórðu fóðursiloir og ein fóðurgoymsla bygd aftrat virkinum í Fuglafirði.Tá var eisini ætlan gjørd fyri víðkan av goymsluni, sum so verður bygd nú. Tann høllin, sum hygd varð í fjør, er 1.700 fermetrar. Hallirnar báðar eru samanbygdar, so alt í alt verður goymslan hampiliga stór, tá hendan útbyggingin er liðug, letur stjórin at.

Grundin verður stoypt soleiðis umleið hálvan metur upp, og síðan verður stálkonstruktión, sum verður klødd við plátum, sett omaná.

Tá hendan útbyggingin er liðug, verður roknað við, at goymslan er nóg stór. Í hvussu so er í fyrsta umfari, sigur Bergur Poulsen.

Næsta stigið verður so at fara undir at økja framleiðsluorkuna á mjøldeildini. Hendan ætlanin verður ikki gjøgnumførd fyrr enn komandi ár, sigur hann. Tó verður projekteringin gjørd í ár. Hvussu nógv tann útbyggingin fer at kosta, verður ikki sagt nakað um enn.

Bergur Poulsen letur væl at tilgongdini í ár. Tað er nógvur fiskur at fáa í løtuni, sigur hann. Havsbrún hevur í ár tikið í móti meira fiski enn um somu tíð í fjør.

Tað eru svartkjaftaskipini, sum landa til Havsbrún nú, sigur hann. Føroysk og írsk skip.

Føroyingarnair royna suðuri á Munkagrunninum, har teir fáa væl, meðan írarnir eru nakað syðri, sigur Bergur Poulsen, sum væntar ein íra at landa fyrsta dagin.


*Havsbrún er farið undir árligu útbyggingina, sum í ár umfatar seinasta part av goymslubygninginum*

*Mynd: Edvard Joensen*